»Um tú ikki tímur og vil na

Hóast tú ert pensióneraður, hevur tú royndir at lata av, og hevur tú heilsuna og áræði, so ber til at halda seg framat. Og tað ger Petur á Svøð í Klaksvík, sum 69 ára gamal er farin til arbeiðis í Norðoyatunlinum

PENSIÓNSALDUR

Orð og myndir: Dávur Winther

– Um tú ikki tímur og vil nakað - ja, so verður einki!

Hetta plagar Petur á Svøð at taka til. Hann verður sjeyti ár í august, og hóast hann hevur havt eitt hendingarríkt lív, hevur hann ikki sett seg afturá, nú hann er komin upp í árini.

Sum 14 ára gamal fór hann til skips. Hann byrjaði við loddi, men endaði seinni á táverandi størsta tangaskipinum í flotanum hjá A. P. Møller. Sum sjómaður hevur hann siglt víða. Tú hevur ikki verið leingi saman við honum, so hevur hann greitt tær frá onkum av teimum mongu spennandi ferðum hansara úti í heimi. Og harmonikan hevur verið næstan líka nógvar staðir, sum Petur hevur verið.

Petur á Svøð hevur seinu nógvu árini arbeitt hjá Landsverk, sum vegaumsjónarmaður. Í heili 40 á var Petur í starvi hjá LV og eisini eitt tíðarskeið knýttur at Phil & Søn. Petur á Svøð hevur altíð verið nærlagdur og tað hevur verið umráðandi fyri hann at vera fyristur á staðnum – fyrstur upp og fyrstur til arbeiðis.

At gera arbeiðið til lítar, so at eingin kann setan nakran fingur á tá tað, sum Petur hevur havt á hondum, liggur honum dýrt á. Ja, stutt sagt ærukærur!

Sum vent í holuni

Tí var Petur á Svøð ofta heldur hugtungur at práta við, eftir at hann í 2002 legði frá sær, tí skipanin sigur, at so skal vera.

Hann plagdi at siga: "Eingin hevur brúk fyri mær longur, eg nytti einki"!

Hetta segði hann væl vitandi, at hann bæði tímdi, nyttaði, orkaði og hevði góðan hug at halda fram í sínum arbeiði.

Tí var tað ein rættur unglingi at síggja í Peturi henda dagin, eg kom fram við honum og hann sat í einum lastbili. Eg fekk eitt lítið prát við hann, men bara eitt lítið prát.

–Nå, eg havi ikki tíð, segði hann og syfti seg inn í lastbilin við einum dreingjasmíli – glaður og nøgdur um, at hann nú aftur var ímillum hinar menninar í Norðoyartunlinum og gjørdi

Petur á Svøð er nú aftur farin til arbeiðis. Hann skal verða við í arbeiðnum at gera veitir og leggja veitingar í Norðoyatunlinum